# Til fyriskipandi felagið

## *Viðvíkjandi hvat skal gerast til steypakappingar*

**Kvøldið fyri kapping:**

- Høllin skal klárgerast við amboðum o.ø.
- Høllin skal ruddast.
- Seta borð upp til atgongumerkjasølu + stólar.
- Seta dómaraborð upp + stólar til dómarar.
- Fimleikasambandið syrgir fyri at dúkar, pennar, blokkar o.a. kemur í høllina og felagið syrgir fyri, at tað kemur á borðini.
- Áskoðarapláss skulu gerast klár.
- Tryggja, at mikrofon er klár.

**Meðan steypakappingarnar fara fram**

- Felagið tekur sær av atgongumerkjasølu. Avtala um kostnað og gjaldsterminal skal gerast við Fimleikasambandið. Fimleikasambandið syrgir fyri vekslipengum og evt. gjaldsterminali.
- Felagið skaffar skeltiberarar.
- Felagið kann selja kaffi/te og køkur.
- Felagið hevur ábyrgd av, at dómarir og hjálparfólk við dómaraborð fáa kaffi/te, frukt ella okkurt annað til steypakappingarnar. Felagið og Fimleikasambandið avrokna hetta eftir kappingina.
- Felagið syrgir eftir avtalu við Fimleikasambandi fyri morgunmati og døgurða til dómararnar og hjálparfólk. Felagið og Fimleikasambandið avrokna hetta eftir kappingina.
- Eftir steypakappingarnar skal felagið skaffa fólk at rudda høllina. Amboðini skulu uppá pláss, borð og stólar ruddast.
- Fimleikasambandið hevur ein tøkan persón í høllini undir kappingin, um okkurt er.